Frá Arbeiðarafelagnum

»Hæddin«

Søkt verður eftir einum fólki at vaska 2 tímar um dagin.

Mánadag til og við fríggjadag kl. 15.00 til 17.00.

At byrja skjótast gjørligt.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til »Hæddina«.

Umsóknir til starvið skulu verða nevndini í hendi í seinasta lagi 18. mai 2002.

Nevndin

Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi til Barnagarðin við Velbastaðvegin 35 tímar um vikuna, at byrja 1. juni 2002.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3 – 7 ár, býtt sundur í 3 stovur.

Á hvørjari stovu starvast tveir pedagogar og eitt hjálparfólk.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum. Viðkomandi, ið settur verður, skal duga at síggja møguleikarnar í okkara náttúruumhvørvi saman við børnunum.

Løn og setunartreytir eru sambart sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 20. mei 2002 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

Barnagarðurin við Vebastaðvegin
Velbastaðvegur 41
FO-ba100 Tórshavn

J & K BETONG

Søkt verður eftir raskum manni at arbeiða á blandistøðini.

Arbeiðið verður bæði á blandistøðini og koyring við betong.

Stóra koyrikortið krevst

J&K **Tlf. 315060/215005**
e-mail: JKP@JKP.FO

»Fótbóltsskúla-venjari«
Er hetta ikki júst nakað fyri teg?

...sigur tú ja, verður tú ein snøggan dýnujakka heitari!!

Fótbóltssamband Føroya ætlar at skipað fyri fótbóltsskúlum aftur í ár.

Hetta er eitt sosialt tiltak, har børn úr øllum landinum í aldrinum 8–14 ár møtast til tveir upplivingar-ríkar dagar, og er hetta ein líka stór uppliving fyri venjararnar.

Fyri at hetta tiltak skal framhaldandi eydnast væl, so krevst at vit fáa nokk av venjarum og lýsa vit tí eftir venjarum til fylgjandi skúlar:

28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Tórshavn**
28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Vági**
28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Vágum**
28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Klaksvík**
05.07.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**06.07.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**á Toftum**

Treytir fyri at tilmelda er, at tú hevur tikið minst eitt venjara-grundskeið ella at tú hevur hollar royndir innan venjara-yrki, og at tú ert fylt/fyltur 16 ár.

Freistin at tilmelda er 15. mei 2002, hetta kann gerast við at senda niðanfyri standandi tilmeldingarlepa til FSF, Postrúm 3028, FO-110 Tórshavn, ella at faxa lepan til fax nr. 319079.

✂----------

TILMELDINGARLISTI
Til Føroya Fótbóltsskúla 2002

Navn: _____ **Aldur:** _____

Bústaður: _____ **Tlf.:** _____

Lokið skeið/royndir: _____

Ynski at vera venjari á fótbóltsskúlanum í/á: **Tórshavn** ❑ **Toftum** ❑ **Klaksvík** ❑ **Vágur** ❑ **Vágar** ❑

Ynski at venja aldursbólk: **8–10 ár** ❑ **10–12 ár** ❑ **12–14 ár** ❑

Sendast/faxast í seinasta lagi 15. mei 2002, til:
Fótbóltssamband Føroya • Postrúm 3028 • 110 Tórshavn • Telefax: 319079 • e-postur: gudrid@football.fo

Sethúsaklædningur

Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen

Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Útbjóðing

Hervið verður útbjóða at gera partar at skúlaøkinum við Skála skúla liðugt.

Arbeiðið umfatar regnvatnskloakk, garðar, gøtur og hegn.

Útbjóðingartilfar fæst við at venda sær til kommunuskrivstovuna í seinasta lagi fríggjadagin 10.05.2002.

Tilboðini skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 21. 05.2002 kl. 14.00 og kunnu tey bjóðandi vera hjástødd, tá tilboðini verða latin upp.

Bygdaráðið skilar sær rætt at velja millum innkomnu tilboðini ella onki at taka.

Skála Kommuna

bobcat -maskinurnar sum halda!

• **Gravmaskinur** –nógv model
• **Lessarar við óteljandi møguleikum!**

Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.

Keyp góðsku – keyp Bob Cat!

Sosialurin - 311820

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

HEILSANIR

Hjartaliga takka vit øllum tykkym, ið gjørdu hjúnabandsdag okkara so minningarríkan tann 30.11.01. Túsund takk fyri alla hjálp, gávur, talir og fjarrit.
Ranvá og Dan Knudsen

Góði, elskaði Petur
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum 5. mai. Harrans signing í framtíðini.
Ynskja mamma, babba og Pól

Góða mamma og vermamma
Hjartaliga tillukku við degnum. Alt tað besta í framtíðini.
Ynskja Vónbjørt og Edward

Ein hjartans tøll til okkara døtur og ommu- og abbabørn, sum hjálptu okkum at fáa dagin so hugnaligan og festligan tann 12.04. Somuleiðis ein tøkk fyri blómur og telefonsamrøður, tøkk til tykkum, sum vitjaðu okkum. Gud signi tykkum øll.
Diamantbrúðarparið Hannemia og Edmund

Vit vilja takka øllum tykkum, sum á ymsan hátt gleddi okkum á hjúnabandsdegnum 22.12.01. Takk fyri gávur, talur, fjarrit og hjálp.
Kristvør og Eivind Kolden

Góði Sámal
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum.
Omma, abbi og Jan

Góðu Aleksandur og Bárður
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 7. mei. Jesus pápi signi framtíð tykkara.
Heilsan mamma og babba

Góðu Aleksandur og Bárður
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 7. mei.
Bestu ynskir frá ommu



Hjartaliga tillukku við degnum.
Heilsan, vit norðanfyri

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**